


Myndir: Álvur Haraldsen

# best í dag







ikki torir at spæla. Sinnisliga vóru vit nógv meira klárar til finaludystirnar í Klaksvík, og vit vistu, hvat krevst, um tú skal vinna slíkar avgerandi dystir, sigur Birgir Hansen.

Tað var í sætta og avgerandi hálvleikinum millum finaluliðini, at Neistin staðfesti sína støðu sum besta kvinnuliðið í Føroyum. Tá fóru bláu havnarmenninir upp í leikferð og rann mótstøðuliðið um koll.

### Brauer stóran týdning

Tað vísir seg í dag, at Neistin framdi eina fantastiska íløgu, tá serbiska Barbara Brauer varð knýtt at hópinum síðsta heyst. Hon hevur verið betri enn allar hinar í føroysku kappingini í ár. Skotið eina rúgvu av málum, umframt at hava staðið væl í verjupartinum. Hon hevur fegin tikið á seg leiklutin at ganga undan og hevur megnað tað framúrskarandi væl.

Hon prógvaði aftur sítt virði í finalunum. Hóast Bára S. Klakstein mansvardi hana allatíðina, var Brauer millum bestu málskjúttarnar. Tað sigur ikki lítið.

### Birgir heldur fram

Fyrireikingarnar til næsta kappingarár eru so smátt byrjaðar. Tað er nú greitt, at Birgir Hansen, høvuðsvenjari, og Sigrun Mohr, hjálparvenjara, halda fram í sínum starvum. Sigrun Mohr byrjar seinni, tí hon hevur aðrar uppgávur. Ymsar broytingar verða helst í spælarahópinum, men tað fer Neistin at avdúka seinni.

Spurningurin, um besta kvinnuliðið hjá Neistanum skal, eins og mansliðið, umboða Føroyar í altjóða kapping, veit Birgir Hansen framvegis ikki.

– Nú taka vit okkum av løttum nakrar vikur, so fáa vit at síggja, hvat fer at henda næsta kappingarár, sigur Birgir Hansen.

uni@sosialurin.fo